## DAGSINS MEINING

# Sjálvandi skulu menn í barsilsfarloyvi

Tað er so sjálvsagt, at maðurin eigur at fáa sín part av barsilsfarloyvinum, nú løgtingið er í ferð við at broyta barsilsskipanina. Men um vit skulu meta út frá viðgerðini á tingi seinasta fríggjadag, so kunnu vit gloyma alt um tað. Løgtingsins hugsan er, at tað er kvinnan, sum eigur at vera heima og ansa børnum. Finna maður og kona kortini út av, at maðurin kann hjálpa til, so tey um tað.

Hetta er støðan hjá einum so at siga samdum løgtingi – undantikin eru tey bæði, Annita á Fríðriksmørk og Kristian Magnussen, sum sóu hetta meira sum ein sosialan ójavna, har man við longdum barsilsfarloyvi heldur kvinnuna burtur frá arbeiðsmarknaðinum í eitt heilt ár.

Eitt er so tað, at løgtingið ikki vil leingja tíðarskeiðið, har løn verður útgoldin, samstundis sum farloyvið verður longt. Men tað er rættuliga órógvandi, at landsstýrismaðurin samstundis vil taka 10 milliónir úr skipanina – pengar, sum serliga koma teimum lægst løntu til góðar. Hetta verður gjørt við at stytta tíðarskeiðið fyri útrokningargrundarlagnum úr einum ári til seks mánaðir. Hetta gongur út yvir tey við lægru og ójøvnu inntøkunum, meðan tey í tryggum størvum við høgum lønum einki merkja. Sosialt órættvíst so tað stendur eftir!

Barsilsskipanin hevur verið eitt stórt framstig á arbeiðsmarknaðinum. Men um vit ikki fáa eina betur javnvág millum kvinnu og mann, so verður barsilsskipanin eitt afturstig, tí við henni verður kvinnan hildin burtur frá arbeiðsmarknaðinum í alt ov langa tíð. Hetta fer at merkja, at menn fáa nógv betur møguleikar á arbeiðsmarknaðinum, tí at arbeiðsgevarar fara at hveppast við at seta eina kvinnu í starv, sum fer at verða burtur frá arbeiði í kanska upp til trý ella fýra ár.

Hetta mátti sagt nóg mikið. Tað er ikki so trupult hjá monnum at ganga heima og ansa børnum. Tvørturímóti er tað eitt privelegium, sum allir menn áttu at gjørt sær dælt av. Tá tingmenn fara at tosa um, at menn ikki kunnu geva bróst, so er hetta bert eitt dømi um primitivan hugsunarhátt – og at teir ikki vilja skilja málið og ikki tora at viðgera málið í tí álvara, tað hevur uppiborið.

Ber ikki til at fáa eitt ára barnburðarfarloyvi við løn í fyrstu atløgu, so eigur hetta at verða gjørt yvir eitt í lógini ásett tíðarskeið. Men tað er av alstórum týdningi, at ein ávísur partur verður til mannin, t. d. tríggir mánaðir. Tekur maðurin ikki tríggjar mánaðir, so eigur kvinnan bert at fáa hinar níggju mánaðirnar. Á henda hátt fáa vit ment eina hugburðsbroyting, sum førir til javnrættindi, og sum hevur fyriliti fyri tørvin hjá familjuni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Heldur Landsstýrið gjørdar avtalur?

**Daniel J. Thomsen**
*Kvívík 26.11.02*

Mikil er tann orka og mong eru orðini nýtt eru í politiska kjakinum, verið hevur her á landi seinastu árini um útbygdu vælferðina ella manglar við henni. Eisini er tann stóri tokki politikararnir hava til tey gomlu, til fólkapensionistarnar, umrøddur og so rørandi.

Ei dánin í. Tað vóru jú tey sum í 1998 lótu Fullveldislandsstýrinum eitt vælvirkandi samfelag at umsita.

Hesi fólkini, núverandi fólkapensionistarnir, fingu ringast tonkiliga byrjan í lívinum. Tey stettlaðu inn í verðinskreppuna í 1930-árunum ella vóru borin inn í hana. Tey komu á arbeiðsmarknaðin í sjálvgjørdu føroysku kreppuna í 1950-árunum, eftir at framfúsnir føroyingar í fyrilitaleysum ótolni keyptu rustað burturkast úr Íslandi og Onglandi at trola við og harvið søplaðu peninganøgdina frá krígsárunum burtur. Við hollari danskari hjálp strevaðu tey seg úr kreppuni og bygdu vælvirkandi fiskivinnusamfelag upp.

Aftur rakti sjálvgjørd føroysk kreppa tey í 1992, tá úrslitini av villa »stolta« sjálvrósta vinnu- og fíggjarpolitikkinum frá 1986-87-88 ikki kundu krógvast longur. Góðu knotur og seiggið í hesum fólki saman við dyggum donskum peningastuðli vunnu eisini á hesi kreppu. Soleiðis kom fullveldislandsstýrið til bygd hús og skorin klæði, sum orðatakið sigur.

Hvussu takkaði landsstýrið fólkapensionistunum fyri alt tað, teir løgdu eftir seg við fráferð av arbeiðsmarknaðinum. Jú tað tók hálva fólkapensiónina, teir skuldu hava eftir avtalu frá 1987.

**Avtalan um blokkin**
Tann 9. mars 1987 gjørdu Javnaðar-/ Tjóðveldislandsstýrið avtalu við regeringina í Keypmannahavn, um at sleppa undan endurgjaldsskipanini, ið gav landsstýrinum endurgjald fyri útreiðslur av ríkis- og felagsuppgávum. Hon sigur at staturin rindar 50% av fólkapensiónini og at pensiónsparturin er 25% av blokkinum. Tað var staðfest við Folketingslov frá oktober 1987 (Bemærkninger til lovforslag síðu 2).

Víðari sigur grein 5 í avtaluni »statslige merudgifter i 1987-prisniveau justeres satserne på pensionsområdet således, at der med hensyn til forskelle i beskatning m.v. sikres samme disponible indkomst for pensionsmodtagere på Færøerne og i Danmark«. Eftir hesi avtalu hevur regeringin goldið landsstýrinum:

| | Blokk | Fólkapens. 25% |
|---|---|---|
| 1998 | 908 mió. | 227,00 mió. |
| 1999 | 933 - | 233,25 - |
| 2000 | 958 - | 239,50 - |
| 2001 | 982 - | 245,50 - |
| **Til saman** | **3.781 mió** | **945,25 mió** |

Soleiðis hevur landsstýrið fingið 945,25 mió. at gjalda fólkapensionistunum, men hvat hevur tað gjørt? Jú, peningurin er næstan allur koyrdur í Landsbankan og kallast uppsparing. Um nú renta og rentisrenta 6% verður løgd til mánaðargjaldið frá 1.1.1998 til 1.1.2002 er peningur pensionistanna vorðin meir enn milliardin.

Tá eg sigi, næstan allur peningurin er farin í Landsbankan er orsøkin tann, at donsku fólkapensionistarnir fáa minstuveiting kr. 6.200,- meðan teir føroysku fingu kr. 3.313,- fram til 30. apríl 2002 so munurin gjørdist kr. 213,- meir enn hálva pensión.

Sjálvan valdagin 30. apríl 2002 sendi landsstýrið øllum pensionistum viðbót kr. 1008,- Eitt bláljós at blinda pensionistarnar, so teir ikki varnast, at fíggjarmálaráðharrin hevði lagt lógforslag fyri Folketinget om at veita fast tilskot til føroysku fólkapensiónina kr. 213,6 mió. fyri inniverandi ár. Folketinget samtykti tað beint áðrenn tað fór í summarfrí 5.6.2002. Longu frá 1.1.102. var 1/12 forskotsvís goldin landsstýrinum um mánaðin.

Vil landsstýrið soleiðis dríva forrætning við fólkapensionistunum, tað fær kr. 213,6 mió. úr Danmark til teirra, men letur teimum bert 50 burturav, meðan hinar kr. 163,6 verða koyrdar í Landsbankan og kallast rakstraryvirskot, ella er regeringin lumpa inn í eitt myrkaspæl?

Krav pensionistana má verða at minstaveiting við øllum viðbótum – full pensión – verður goldin frá 1.1.2002. Síðan má skil fáast á spurninginum um milliardina. Framferðin hevur higartil, eisini hjá sjálvbjargnislandsstýrinum , verið ódámlig fyri ikki at siga óhugnalig.

**Hvat gera pensionistafeløgini?**
Kanska flestu ella í hvussu so er meginparturin av umleið 7000 fólkapensionistunum eru limir í pensionistafelag, so her er talan um størri felag enn Føroya Fiskimannafelag og Føroya Arbeiðarafelag tilsamans, sum skuldi havt nóg góða styrki at røkt størsta áhugamál limanna.

Man nakar kunna fyristilla sær, at feløgini á arbeiðsmarknaðinum høvdu sitið hendur í favn og hugt at, meðan meir enn 200 mió. vóru tiknar frá teirra limum árliga, ella hvar hevði tann persónur, ið fingið hevði til uppgávu at umsita og útgjalda meir enn 200 mió. til navngivnar persónar verið, um hann ikki gjørdi tað, men í staðin setti tær í banka til sín sjálvs? Mundi hann ikki farið í geglið? Eigur politikkur at vera annarleiðis?

Um nøkur meining skal verða í pensionistafeløgum, mugu tey skaffa limum sínum, fólkapensionistunum, tær pensiónir, teir hava lógarfestan (Folketingslov) rætt til. Síðan kunnu tey hugna sær.

**Hvar er andstøðan á tingi?**
Tað er hugstoytandi, at ikki skal vera so mikil stiril í andstøðuni, at hon átalar tí búskaparliga lemjandi viðferð landsstýrið gevur teimum 7000 fólkapensionistunum, sum hon hevur at takka fyri at sita fjálgt og gott.

**PS:** Løgtingsins umboðsmaður átti at hava so mikla virðing fyri landsins íbúgvum, at hann av eintingum kannaði rættindi pensionistanna og átalaði landsstýrið fyri tess ránsferð móti pensionistunum og tingið ella lands-stýrismannanevnd tess fyri líkasælu í sama máli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Føroyskar loysnir ???

**Andrias Petersen**



Kjartan Hoydal hevur í Fregnum tann 22. nov. áhugaverda grein, har hann spyr eftir føroyskum loysnum á teimum trimum stóru útreiðslukrevjandi økjunum: almannamál, heilsumál og skúlamál. Sjálvur kemur hann ikki við nøkrum ítøkiligum. Kjartan Hoydal er ikki hvør sum helst. 10 ár sum sentralur persónur í føroysku miðfyrisitingini, ein av oddamonnunum í loysingarsamtakinum Hesuferð og so ella so tætt knýttur at Tjóðveldisflokkinum.

Tað sum undrar meg er, at hann spyr eftir serføroyskum loysnum á hesum trimum økjum, uttan at ítøkiliggera tær, og tað sum undrar uppaftur meir er, at Tjóðveldisflokkurin, nú á fimta ári í landsstýrinum ikki hevur spælt nakað út um, hvørjar serføroyskar loysnir skulu verða, hóast dúgliga hevur hildið uppá at tær finnast. Spurningur mín er, um tað finnast so serligar serføroyskar loysnir, sum eru nógv ørvísi enn tær í teimum Norðurlondum, vit vanliga samanbera okkum við.

Ein fyritreyt er tá at staðfesta munin ímillum tað føroyska fiskivinnusamfelagið og t.d. fiskivinnusamfelagið í Kyst-Norge, á Norðureysturlandinum í Íslandi ella fiskivinnu samfeløgini í Vestur Jútlandi. Um munur er, skuldu vit funni hann í hesum økjum.

Spurt verður eftir serligum føroyskum loysnum, helst við tí fyri eyga, at tær skulu verða bíligari fyri landskassan, og sjálvandi kunnu vit finna sovorðnar loysnir, sum eru bíligari, men okkara stóri trupuleiki er, at tá vit hava verri skipanir á hesum økjum, er vandi fyri at fráflytingin økist, og so eru vit samanlagt verri fyri at mennast.

Javnaðarflokkurin er altíð tilreiðar at viðgera tær ymisku samfelagsskipanirnar á skúla-, heilsu- og almannaøkinum, eisini við atliti til ein sjálvberandi búskap, men vit taka fyrst og fremst hædd fyri, at støði er sambærligt við hini norðanlondini, fyri at halda fólkið í landinum. Hetta er helst størsti munurin á okkum og Tjóðveldisflokkinum, sum setur fullveldi fyrst, og so má fólki laga seg eftir tí, og um vit eru fleiri ella færri verður ikki avgerandi.

Vit hava bíða eftir ítøkiligum útspæli frá Tjóðveldisflokkinum og restini av samgonguni nú í fýra ár, men enn er einki ítøkiligt komið, bert verði yvirordnaður national romantikkur, sum ikki kann brúkast til nakað í viðgerðini av vælferðaskipanunum í framtíðarsamfelagnum.

Okkara styrki og veikleiki er, at vit hava eitt ógvuliga vælútbúgvi fólk, har stórur partur er førur fyri at arbeiða allarstaðir í heiminum, og serliga í Norðurlondum. Tí er neyðugt tá tú viðgerð vælferðarskipanirnar, at hesar liggja nøkulunda á sama støði sum aðrastaðni, annars flytir fólki. Søgan hevur víst tað í 30´-, 50´- og 90´unum, tá tær stóru samfelags kreppurnar vóru. National romantikkur er ikki nokk í tí globaliseraða heiminum.

Nú tá vit viðgera samfelagsskipanirnar í Føroyum, er nærliggjandi, fyrst at byrja í erva, og hugsa um miðfyrisitingin ikki kundi verið broytt. Eg eri samdur við Kjartani Hoydal í, at tað Norman-Christensen´ska modelli ikki var nøktandi. Vit fóru jú úr landsstýrinum av somu orsøk í 1996.

Men fullveldissamgongan síðani 1998 hevur útbygt hetta so tað nú er nærum skomm. 45.000 fólk við 9 landsstýrismonnum og undirliggjandi fyrisitingum. Hvat við at lagt hetta tal fast á 6 ministeriir, íroknað løgmann, og so mátti politiska kabalin við samgonguskipan laga seg eftir tí, og onnur atlit verði tikin við nevndarsessum og øðrum.

**Miðfyrisitingin kundi sæð soleiðis út.**
Løgmaður:
(eftirlit við landsstýrisarbeiðinum, uttanríkismál, fiskivinnusamráðingar, yvirordnað starvsfólkamál umframt lógardeild)

Fíggjarmál:
(sum nú + framtaksgrunnurin, íleggingargrunnur, fíggingargrunnurin frá 1992)

Trivnaðarmál:
(heilsu og almannamál)

Mentamál:
(skúli, hægri útbugvingar, mentan og kirkja)

Vinnumál:
(fiskivinna á landi og sjógvi, alivinna, oljuvinna og onnur privat vinna)

Innlendismál:
(kommunir, FøroyaTele, SEV, IRF, Strandfaraskip Landsins, Landsverkfrøðingurin, bústaðarviðurskifti, umhvørvismál)

Hetta er eitt hugskot, sjálvandi er ikki alt við, men tað skuldi ikki verið trupult at koyrt ónevnd øki í hesa skipan. Eftir hesi skipan er møguleiki fyri at rationalisera miðfyrisitingina.

Útspælið um hvørji øki eru serføroysk, og hvussu tey skulu skipast, bíða vit spentir eftir frá samgonguni, sum nú situr á fimta árið í landsstýrinum, og sigst ætla sær at útbyggja ein sjálvberandi føroyskan búskap. Vit í Javnaðarflokkinum eru tilreiðar at viðgera slíkar spurningar, og gera okkara ávirkan galdandi. Politikkur snýr seg um at finna nýggja leiðir og tora at gera breiðar semjur.

# Tá einki annað gerst, ber til at finnast at

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



**Vit eru sum politikarar vald til at loysa politisk- og samfelagsmál , og tað eigur at vera fremst í okkara huga**

Í Sosialinum seinasta týsdag hevur Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður viðmerkingar til røðu, sum eg helt í samband við Trivnaðar- og heilsudagarnar í Norðurlandahúsinum 14. og 15. november.

Ein hevur sagt, at: "Gert tú lítið í politikki, so kanst tú í øllum førum finnast at".

Í røðu míni vísti eg á, hvussu stórur partur av fíggjarlógini varð nýttur til almanna- og heilsumál eitt nú í Danmark, Noregi og Íslandi, og sammetti hetta við, at vit í Føroyum lutfalsliga lógu á leið og omanfyri hesi londini.

Hetta hevur við sær, at vit ikki kunnu rokna við eini størri lutfalsligari upphædd á fíggjar-løgtingslógini. Hetta ger seg galdandi, hvør flokkur so kemur at sita við róðrið.

**Neyðugt við nýhugsan**
Tí var eg inni á, at vit mugu síggja í eyguni, at neyðugt verður við nýhugsan, við einum broyttum hugburði og at peningurin verður brúktur á ein skinsamligari hátt.

Her kann eg leggja afturat, hetta snýr seg ikki bert um almanna- og heilsuøkið, men um øll øki á fíggjarløgtingslógini.

Lat meg endurtaka tað sum eg segði, at "tey veiku og sjúku skulu vit raðfesta høgt, og at vit skulu hava ráð til hesi, men ikki til eina fløkta og ov stóra umsiting".

At umsitingin er økt er einki nýtt, hetta er nevniliga tað, sum eg ávari ímóti, og havi ávarað ímóti í mong ár. Eisini havi eg, og fari eg framvegis at ávarað ímóti hesum sum samgongulimur. Hóast hetta, er umsitingin økt og nógv økt, eins og tá Vilhelm Johannesen sat við róðrið.

**75% av fíggjarlógini**
Í míni røðu í Norðurlandahúsinum vísti eg eisini á, at almanna- og heilsøkið saman við gransking og útbúgving – sum er tyngsti partur av fíggjarløgtingslógini – fær í dag 2,4 milliard krónur av 3.2 milliardum krónum. – Hetta er 75% ella tríggir fjóðringar av løgtingsfíggjarlógini.

At Vilhelm Johannesen bítur seg fastan í, at fíggjarløgtingslógin 2003 er uppá 3.631.207 milliónir krónur heldur enn rakstrartølini eg vísi á, sum eru uppá 3.2 milliardir krónur, er møguliga fyri at gera seg "interessantan". Bæði tølini kunnu vera røtt. Spurningurin er, hvussu tað verður sett upp. Munurin er ein rentupartur o.a., sum verður nýttur til nakað ávíst, og ikki kann brúkast til annað.

Alt annað, sum Vilhelm Johannesen skrivar um, tí okkurt skal hann jú av og á "profilera" seg við, fari eg at lata standa í hesum umfari.

Vit eru sum politikarar vald inn av okkara fólki til at loysa politisk- og samfelagsmál, at loysa tey á bestan hátt við ábyrgd og tað eiga vit at hava fremst í okkara huga.

# Jólakonsert í Glyvra kirkju

**Sunnudagin 1. desember, verður konsert í Glyvra kirkju við luttøku av tveimum orkestrum, Nes sóknar Musikkfelag og GHM. Hetta samstarv er fingið í lag av venjaranum hjá NSM, Ken Jones. Hann er eisini venjari hjá GHM**

KONSERT
*Tíðindaskriv*



GHM, sum er eitt harmoniorkestur, tvs., at har eru bæði horn og træblásarar við, telur uml. 25 spælarar. Á skránni hjá teimum verður eitt stykki hjá Vivaldi, filmstema úr "The Gothfather", Romantic Mood og Evening Prayer. Orkestrið hevur 3 venjarar: Ken Jones, Andreu Heindriksdóttir og Odd Hentze, men á konsertini fara venjararnir at spæla við, og tí verður tað Martin Mouritsen, ið fer at stjórna orkestrinum á konsertini.

Nes sóknar Musikkfelag er sett saman av spælarum úr bygdunum kring Skálafjørðin og úr Oyndarfirði. Har eru bæði ungir og eldri spælarar, frá 12 til 72 ár, og tilsamans eru tey 25. Orkestrið spælir regluliga til mong ymisk tiltøk: stevnur, hátíðarhald, konsertir og tendring av jólatrøum. Leiðari hjá orkestrinum er musikklærarin Ken Jones. Á konsertini spælir orkestrið eina skrá við jólatónleiki.

Konsertin í Glyvra kirkju sunnudagin byrjar kl. 16.